# Errin men eisini skuffaður

**Hans Marius Ziska er glaður um at hava fingið eitt sætta pláss heim við til Føroyar, men ergrar seg samstundis um, at hann ikki vann**

GBOB
*Orð og myndir: Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Hans Marius er ein sterkur oddamaður í Marius*

Marius deildi sætta plássið í finaluni í The Global Battle Of The Bands við amerikansku favorittarnar Bulding A Better Spaceship, og hetta má metast, sum eitt sera heiðurligt úrslit. Marius gjørdist sostatt besti norðurlendski bólkur framman fyri Noreg, Svøríkið, Danmark, Finnland og Ísland.

Oddamaðurin, gittarleikarin, sangskrivarin og sangarin í Marius, Hans Marius Ziska viðgekk beint aftan á, at raðfylgjan varð kunngjørd, at hann hevði blandaðar kenslur um sætta plássið. “Sjálvandi er tað ongantíð stuttligt ikki at vinna. Men eg eri glaður fyri at hava givið Føroyum ein plassering. Hetta er jú fyrstu ferð vit luttaka. Tað hevði verið keðiligt ikki at verðið nevndur, so á tann hátt er tað gott.”, segði Hans Marius.

### 6. fremstir í heiminum

Einans teir seks bestu bólkarnir fáa at vita, hvat nummar teir eru blivnir. Hans Marius sigur við Sosialin, at hann heldur sjálvur, at tað er flott at gerast millum seks tey bestu. Eisini Jón Tyril føroyski fyrireikarin av kappingini er væl nøgdur við úrslitið hjá føroyska luttakaranum. Hann vísir á, at tað ikki er í nógvum kappingum, at Føroyar eru 6. fremstar í heiminum.

### Heiðurligt tap

Hans Marius leggur dent á, at hann, sum allir aðrir føroyingar, er troyttur av at hoyra um heiðurlig tap, hvørja ferð landsliðið í fótbólti t.d. tapur 7-1. Men tá tað er sagt, so heldur hann, at hetta er eitt úrslit, teir kunnu vera ernir av.

Limirnir í Marius hava eisini alla orsøk til at vera ernir. Millum føroysku áskoðararnar var spenningurin stórur móti endanum. Tí tað var greitt, at hetta kundi gerast ein sigur. Eingin greiður vinnari var, og fólk høvdu nógv ymisk boð millum annað Marius. Framførslan hjá Marius var ordiliga góð, og bólkurin var fyri meg persónliga eitt gott boð uppá ein vinnara, tó í koyrir umaftur og umaftur, lætt kundi gjørst ein landaplága.

### Írar vunnu

Tá avtornaði, var tað tann rái eitt sindur punkkendi rokkbólkurin Kopek úr Írlandi, ið fór við sigrinum. Eg hevði ikki væntað, at hesin bólkur fór at blanda seg í toppin, hóast framførslan var góð. Serliga var tað tann hálvan annan metur høgið sangarin, ið við síni eitt sindur ráu rødd rørdi við okkurt. Seinna lagið hjá bólkinum rættiliga fangandi, men eg helt ikki teir skaraðu framúr.

### Ov harður rokkur

Finalan í Global Battle Of The Bands gjørdist sum heild ein áhugaverd og stuttligt tónleikauppliving, har nakrir bólkar veruliga skaraðu framúr. Sum fráleið gjørdist konsertin næstan ikki til at halda út, at hoyra 24 bólkar spæla í samfullar 5 tímar, setir stór krøv til oyrini á áhoyrarunum, og



*Heðin er altíð ein framúr gittarleikari og spælir ein stóran leiklut í Marius*

tættari kapping við Mexico, Holland og Skotland. Løgini vóru popputtur rokkur sungin og spæld væl. Marius hevur ment seg nógv hetta seinasta hálva árið, og hevði eitt øgiliga heiltstoypt konsept, har var útstráling, løg, tekstir og spæl sum hekk væl saman. Bólkurin umboðaði Føroyar væl.

Eins og allir hinir bólkarnir spældi Marius tvey løg, og vísti her fjøllbroytni í bólkinum. Fyrra lagið hevði meira dýpd, meðan tað seinna við niðurlagnum, sum ikki minst hjá dómarunum. Tann harði rokkurin var væl umboðaður, og tá íslendsku Fanngean komu á pallin sum bólkur nummar 23 og spældu enn eina harða tungmálmskonsert, hevði bólkurin ikki ein livandi tjans fyri at gera seg galdandi. Oyrini vóru mett, og tað gjørdist bara larmur.

Eisini Hans Marius sangari í Marius, helt tann harða rokkin vera eit sindur ov nógv av tí góða. Hann segði, at kappingin sum heild var merkt av ov nógvum NU-



*Dan Jordan er oddamðaur í írsku Kopek, ið gjørdust samlaði vinnarin av kappingini*